# Skips Sosialurin
## - TÍÐINDI TIL SJÓFÓLK






## Nú er tað gjørligt hjá okkara sjófólki at fylgja við hvat hendir

Fá ein heilan Sosial sum e-mail, hvørja ferð hann kemur út.

Henda útgáva er gjørd á ein slíkan hátt, at hon fyllir minst møguligt og tískil skjót at heinta niður. Hetta er gjørt við at grafikkurin er tikin burtur, so einans teksturin er eftir og síðani pakkaður niður. Blaðið er sjálvútpakkandi á telduni og verður lisið við browsara, umframt at møguleiki er fyri at skriva alt blaðið út.

Útgávan er serliga ætlað okkara sjófólki, ið hevur atgongd til e-mail umborð á skipinum.

Stuðlað Skips Sosialin hevur

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag

Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

*Undirritaði teknar seg sum haldara av Skips - Sosialinum og fái fyrsta mánaðin ókeypis*

Navn á skipi:

Kontakt pers.:

e-mail:

Undirskrift:

**Hava tygum spurningar í hesum sambandi ring 213982 ella e-mail:** *skipssosialurin@sosialurin.fo*

☐ *Tekst útgáva*
☐ *HTML útgava ( uttan útskrift )*
☐ *HTML útgáva ( við útskrift )*

Sosialurin




# Stjóri til P/F Fiskaaling

**Søkt verður eftir stjóra til P/F Fiskaaling.**
Hevur tú hug til avbjóðingar og vilt verða við til at leggja lunnar undir at menna føroysku alivinnuna, so ert tú møguliga komandi stjórin á P/F Fiskaaling.

Viðkomandi, ið settur verður, hevur ábyrgdina av, at felagið við atliti til endamálið verður rikið undir handilsligum treytum.

**Høvuðsuppgávurnar hjá P/F Fiskaaling eru:**

- At gera vísindaligar royndir við aling av fiski, skeljadýrum v.m. herímillum skapa møguleikar fyri aling av nýggjum fiska- og skeljasløgum
- At gera royndir við nýggjum aliøkjum
- Við kynbótaarbeiði at bøta um alitilfar og við sølu av framleiðslum burtur úr hesum spjaða framgongdina skjótast gjørligt til vinnuna
- At reka vinnuligt virksemi innan virksemisøki felagsins

P/F Fiskaaling rekur vinnuligt virksemi innan kynbótaarbeiði við laksum og sílum, og framleiðir felagið laksa- og sílarogn.

**Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur fylgjandi førleika:**

- útbúgving frá hægri lærustovni
- góð leiðslu- og samstarvsevni
- royndir at standa fyri vinnuligum virksemi
- evni at seta fyriskipanir í verk
- kunnleika til fíggjarstýring
- kunnleika til alivinnuna og til lívfrøði er ein fyrimunur.

**Setanartreytir**
Arbeiðsstaðið er á høvuðsskrivstovuni hjá P/F Fiskaaling Við Áir. Starvið verður sett skjótast gjørligt, men vit hava møguleika at bíða nakað eftir rætta viðkomandi. Lønin verður ásett eftir nærri avtalu, í mun til útbúgving og starvsroyndir.

Vilja tygum hava nærri upplýsingar um starvið, kunnu tygum seta tygum í samband við Janet Fríðu Johannesen, nevndarformannn tlf. 212211 ella við telduposti: jj@atlanticon.fo.

**Umsókn**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum, skulu sendast til Janet Fríðu Johannesen, co/Atlanticon, Bryggjubakki 4, Postboks 263, FO-110 Tórshavn, í seinasta lagi 1. mars 2004. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

*P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. P/F Fiskaaling hevur virksemi Við Áir, í Nesvík, í Skopun og í Hesti. Samlaða starvsfólkatalið er 23. P/F Fiskaaling er merkt av kreppuni í alivinnuni. P/F Fiskaaling stendur fyri kynbótaarbeiði við laksi og sílum. Endamálið við kynbótaarbeiðnum er at ala fram ein frískan fisk, sum hevur best møguligar eginleikar, soleiðis at føroyska alivinnan er betur kappingarfør á altjóða marknaðinum. Arbeitt verður við at effektivisera kynbótaarbeiðið. Arbeitt verður eisini við at menna kalva og onnur nýggj fiskasløg til føroysku alivinnuna. Arbeitt verður við at menna granskingina, sum náttúrliga hoyra undir virkisøki felagsins. Meiri fæst at vita um felagið á www.fiskaaling.fo*

P/f Fiskaaling
Aquaculture Research Station of the Faroes


# Kníva & Skómakarin

Hoydalsvegur 2 · postrúm 1367 · 110 Tórshavn · Tel 314225 · Fartel 214225

**Vit umvæla allar skógvar**
· Forsállingar
· Seymingar
· Hækkan av skóm/styvlum
· Lækkan av hælum
· Skiftan av snarlásum, í styvlum, skóm og leðurjakkum
· Repratión av leðurvørum
· Trykkknappar, lás, nittur
· Styttan av reimum

**Kopiering av lyklum**
· Trioving
· Ruko
· Acea
· Carl F
· Yalle
· Flest allar billyklar

**Alt innan knívasmíð**
· Ibenholt, Zebrawood, Masur Slangutræ, Amboyna burl, Grenadill, Amarant, Redwood, og nógv onnur sløg, fá eitt prát.
· Allar longdir av knívabløðum kunnu fáast og sløgini eru mong. Hondsmíðaði og fabrikeraði

**Graveringar**
Reversskeltir - hundatekin - upplýsingarskiltir - ávaringarskiltir

**Opið er hesar tíðir:**
Mánadag - Fríggjadag kl. 11.00 til 17.30

## Nýtt Nýtt - Fýrverkarí - Nýtt Nýtt

Vit kunnu nú bjóða flottasta og vakrasta fyrverkarí til tann stóra dagin hjá tær, t.d Brúdleyp, Silvurbrúdleyp, bygdastevnur, meistaraheitir, ella kanska fyritøkan hevur onkran stóran merkisdag.
Vit seta eitt tilboð saman fyri teg, og sjálvsagt kunnu vit eisini skjóta av fyri tykkum.
PS vit selja fýrverk alt árið allir pakkar verða leveraðir til ábyrgdarhavandi sum skal verða 18 ár og hetta skal kunna prógvast. Eingin smásøla fer fram, bert ordrar verða avgreiddir.
Bert góðkend vøra verður umboðað her.

Sosialurin 341800



PADI

## Grundútbúgving í kaving

Grundútbúgving í kaving verður í Eysturoy vikuskiftini 13. - 15. februar og 20. - 22. februar

Møguleiki verður at læna kavaraútgerð

Kava verður í turrdrakt!

Tilmelding: 21 89 29 ella j-joensen@post.olivant.fo

**Janus Joensen**
Kavara Instruktør

w w w . f a r o e d i v e . f o

Sosialurin 341800


KIRKJUBØAR KOMMUNA

# Kunngerð

**um framløgu av broyting í byggisamtyktini fyri Kirkjubøar Kommunu**

Sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinri broytingum verður við hesum gjørt kunnugt, at broyting í byggisamtykt/býarskipan fyri Kirkjubøar Kommunu liggur frammi til almenna eftirskoðan millum kl. 9.00 og 16.00 við at ringja til tlf. 228605 ella 215800 í tíðarskeiðinum 4. februar 2004 til og við 25. februar 2004 báðar dagar íroknað.

Kunngerðin við korti hongur uppi í svørtutalvunum á Velbastað og í Kirkjubø.

**Broytingin fevnir um ásetingar fyri øki C (vinnuøki) í byggisamtyktini soleiðis:**

**C.1a.: kemur afturat við hesum teksti:**

**"Loyvt er einans at byggja hús til vinnuvirki ið hava við matvøruframleiðslu at gera og tænastuvirksemi, ið hava samband við hetta".**

**Broytingin talan er um viðvíkir øki matr. nr. 3b Inni í Dølum millum Kirkjubø og Velbastað.**

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot, ið skulu vera skrivlig, mugu verða kommunustýrinum í hendi í seinasta lagi 5. mai 2004.

**Kirkjubøar Kommuna**
**FO-176 Velbastaður**


# Fólk søkist

Søkt verður eftir fólki yvir 18 ár at arbeiða fulla tíð.

Skiftandi vaktir – eina viku um dagin, eina viku um kvøldið.
Tveir leygardagar um mánaðin frá kl. 9.00–14.00.

Eisini verður søkt eftir avloysarum.

Ring á tlf. 522006, 322006, 512480. Spyr eftir Guri.

**Kvikkeyp**



Sosialurin
www.sosialurin.fo